# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Steypafinala í juni

**Longu undan byrjan av Formula-kappingini eru bert fýra lið eftir í kappingini um Løgmanssteypið. Og helst verður steypavinnaran funnin undan summarsteðginum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

29. mars verður farið undir fótbóltslandskappingina, men tvær vikur undan hesum verður sjøtul settur á kappingina um Løgmanssteypið.

16. mars spælir A-landsliðið venjingardyst á útivølli móti Íslandi, men samstundis eru fyrstu dystirnir innleiðandi dystirnir í kappingini um Løgmanssteypið á skránni. Og 20. mars, sum er skírisdagur, koma Formula-liðini eisini í pottin, tá næsta innleiðandi umfarið skal spælast.

Tætt verður millum dystirnar, tí longu 2. páskadag – 24. mars – eru fjórðingsfinalurnar á skránni, soleiðis at tey fýra seinastu liðini í kappingini eru funnin, longu áðrenn farið verður undir sjálva landskappingina.

### Neyvan á ólavsøku

Enn er ikki greitt, nær sjálv finalan verður spæld. FSF hevur í fleiri ár roynt at havt hesa um ólavsøkuna, men soleiðis verður neyvan í ár.

- Soleiðis sum dystarskráin til altjóða uppgávurnar hjá feløgunum sær út, verður helst vónleyst at spæla finaluna á ólavsøku. Endaliga ásetingin er ikki gjørd enn, men tað verður helst so, at finalan verður spæld undan summarsteðginum. Ikki minst tí hetta eisini er ljósasta tíðin á árinum, sigur Karl Vidtfeldt, formaður í Kappingarnevndini hjá FSF.

Og tað verður lagt upp til, at talan verður um sannan finaludag.

- Tað, sum nú liggur í kortunum, er, at finalan um løgmanssteypið verður spæld ein leygardag. Samstundis ætla vit at hava finaluna um FSF-steypið hjá kvinnum, soleiðis at talan verður um ein stóran finaludag fyri føroyskan fótbólt, sigur Karl Vidtfeldt.



*EB/Streymur kundi í hálvmyrkri í fjør lyfta Løgmanssteypið. Í ár verður talan helst um finaludyst í dagsljósi*

# B36-HB dystur í enskari bók

**Andy Mitten, fótbóltsblaðmaður á væl kenda enska fótbóltsblaðnum "Fourfourtwo" hevur grein úr Føroyum við í næstu bók sínari**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Tíðliga í juli í 2006 leiktu B36 og HB ein dyst í Formuladeildini. B36 vann 6-0, og hevur dysturin ofta verið á mannamunnni í Havn. Men nú verður hesin dysturin umrøddur í einari bók, sum kemur at eita "Twenty derbies around the World". Andy Mitten, fótbóltsblaðmaður frá væl kenda enska fótbóltstíðarritinum »Fourfourtwo«, var í Føroyum fyri at uppliva størstu grannauppgerðina her á landi. Hann kom beina leið úr Ibiza og til Føroya. Andy skrivaði eina snøgga grein við litmyndum. Ikki bara um dystin millum B36 og HB, men eisini um Føroyar sum land, vøkru náttúruna, og um hvussu vinarlig fólk vóru ímóti honum og ímóti hvørjum øðrum. Andy segði í RadioActiv á Rás2 fríggjadagin, at B36-HB er einasta vinarliga grannauppgerð hann hevur upplivað í fótbólti. Og at hann var sera hugtikin av serliga stemninginum í Gundadali. Í greinini síggjast eisini myndir av barnavognum, hundum o.ø. fólksligum. "Fourfourtwo" hevur haldarar kring allan heimin, og fer bókin hjá Andy Mitten um tær 20 fótbólts-grannauppgerðirnar tískil at verða seld kring knøttin. Andy hevur vitjað í 67 londum, og hann hevur also valt, at B36, HB og Føroyar skulu hava innivist í hesi bókini saman við Real Madrid, Barcelona og øðrum kendum liðum.



*Grannauppgerðin millum B36 og HB fær innivist í altjóða útgávu um grannauppgerðir kring allan knøttin*


